# Tað er álvarsamt, um verkfallið gongur út yvir sjúkurakt alibrúk

**- Gongdin hjá alarunum er ymisk, men nógvir flóta ógvuliga tungt í sjónum, tí fíggjartørvurin er stórur. Har ringast stendur til, eru møguleikarnir tvinnir. Annar er, at eginpeningurin verður øktur og hin, at framleiðslan av laksi verður minni, sigur stjórin í Føroya Banka, Janus Petersen**

KREPPA Í ALIVINNUNI
*Vilmund Jacobsen*

Tað hevur gingið illa hjá føroysku alivinnuni seinastu tvey árini. Aldi laksurin hevur verið fyri prísfalli, og alivinnan hevur havt tyngjandi dumpingákærur hangandi omanyvir sær. Sum búldur oman á sárið, ið longu er frammanundan, hevur ILA-sjúkan gjørt feigdina um seg víða um á firðum og sundum kring landið.



*Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sigur, at tað krevst stórur dugnaskapur til at stýra avviklingini av einum alibrúki, sum er rakt av ILA-sjúku. - Tað er ógvuliga umráðandi, nú verkfall er, samstundis sum ILA-sjúkur fiskur doyr í nótunum, at alarar ikki verða ov nógv tarnaðir í sínum arbeiði, sigur hann*

## Stór tap

Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, ásannar, at nógv alibrúk flóta rættiliga tungt í sjónum í løtuni.

- Fleiri feløg hava mist nógvan pening og hava tað ógvuliga tungt.

Hann sigur, at ILA-sjúkan, sum hevur verið atvoldin til bráðfeingistøku av fiski, er steinur omaná byrði hjá alarum, tí longu frammanundan er ein stórur partur av alivinnuni illa fyri av prísfallinum, ið verið hevur.

Janus vísir á, at tá ið alibrúk hava ILA í útbroti, siga forskriftirnar, hvussu fram skal farast; tá skal fiskurin takast so skjótt, sum gjørligt til tess at minka um smittuvandan.

## Álvarsamt

Stjórin í Føroya Banka leggur dent á, at nú verkfall er, samstundis sum aliringar skulu tømast fyri fisk, sum hevur ILA í útbroti, er støðan rættiliga álvarsom, um feløgini ikki sleppa at taka fiskin.

- Alarar hava alt sítt "lagur" á sjónum, og sleppur fiskurin at doyggja í nótunum, stendur felagið fyri stórum felli, tí ILA er í sjálvum sær ein ríkiliga stórur trupulleiki.

Janus vísir á, at talan kann vera um framleiðslu av fiski, ið hevur tikið eini tvey ár, og tískil er ein hópur av peningi bundin í fiskinum, sum svimur í nótunum.

- "Lagrið" hjá einum alifelag er soleiðis nógv størri enn vørulagrið hjá eitt nú einum fiskavirki. Hetta kann slett ikki samanberast, sigur hann.

## Tveir møguleikar

Spurdur, um hann væntar, at alifeløg fara á húsagang, ella at virksemið fer at steðga upp vegna fíggjartørv í næstum, nú mótrákið hjá hesi vinnu hevur verið so stórt, sigur stjórin, at tað dugir hann ikki at siga í løtuni.

- Tað veldst um, hvussu veruliga gongdin hevur verið, og hvussu út sær framyvir. Roknskapirnir hjá alivinnuni fara at koma nú, og her fer at síggjast, hvussu stór tap fleiri alarar hava havt.

Janus sigur, at alivinnan hevur ein ógvuliga stóran fíggjartørv, og vágin er stórur. Her skilir alivinnan seg frá øðrum vinnum, tí hetta setir stór krøv til eginfígging.

- Gongdin hjá alarunum er ymisk, og hjá summum gongur frægari. Har ringast stendur til, eru møguleikarnir tvinnir. Annar er, at eginpeningurin verður øktur og hin, at framleiðslan av laksi verður minni, sigur hann.

## Dugnaskapur

Janus Petersen sigur, at tað krevst stórur dugnaskapur til at stýra avviklingini av einum alibrúki, sum er rakt av ILA-sjúku.

- Tað er ógvuliga umráðandi, nú verkfall er, samstundis sum ILA-sjúkur fiskur doyr í nótunum, at alarar ikki verða ov nógv tarnaðir í sínum arbeiði.

Stjórin í Føroya Banka sigur, at ein slík støða er nógv álvarsamari, enn um eitt vørulagur á einum fiskavirki stóð í ljósum loga.

- Tað er ymiskt, hvussu ILA hevur rakt alibrúkini, og hvussu tað hevur eydnast alarum at stýra ímillum skerini. Her hava summir verið meira hepnir enn aðrir, sigur Janus Petersen.





# Stórslakt á Gøtuvík

**Tað hevur bøtt mundandi um støðuna á Gøtuvík, at P/F Luna og Fiskavirkið í Gøtu hava fingið undantaksloyvi at arbeiða við 30 fólkum.**
**- Tann sjúkasti fiskurin svimur vanliga ovast í nótini, og tað er í fyrsta lagi hendan fiskin, vit vilja hava fatur á, soleiðis at fellið verður minni. Atli Gregersen sigur, at tað sær betur út í nótini nú, enn áðrenn tøkan av sjúka fiskinum byrjaði**

ILA OG TØKA
*Vilmund Jacobsen*

Týsdagin høvdu vit samrøðu við Atla Gregersen, sum eitt nú hevur ábyrgdina av alingini hjá P/F Luna á Gøtuvík, har felagið hevur laks gangandi fyri 30 mil-jónir krónur í fimm nótum.

Í tveimum av nótunum, har eini 800 tons av laksi svimja, hevur ein partur av fiskinum ILA í útbroti. Tí krevur skipanin, sum er galdandi á økinum, at hesin fiskur verður tikin sum skjótast.

Atli segði við Sosialin fyrr í vikuni, at í aðrari nótini doyggja eini 150 fiskar um dagin av ILA; í hinari einir 75-100.

- Men tá ið sjúkan fyrst er í útbroti, kunnu tølini av deyðum fiski skjótt "eksplodera", soleiðis at einir 1000 fiskar fara at doyggja um dagin.

## 30 fólk

Men tað er ikki bara á Gøtuvík, at ILA-sjúkan ger feigdina um seg í hesum døgum. Støðan er minst líka so ring hjá onkrum øðrum alara, sum tó hevur valt ikki at gera so nógv burtur úr alment.

Arbeiðarafeløgini, sum eru í verkfalli, hava givið kreppuraktu alibrúkunum undantaksloyvi at taka fisk, sum er fongdur við ILA.

Í Gøtu arbeiða soleiðis eini 30 fólk við undantaksloyvi í hesum døgum og royna at fáa sum mest burtur úr nótini.

Atli Gregersen sigur, at undantaksloyvi, sum arbeiðarafeløgini hava givið, er munagott, og hann ásannar, at støðan hevði verið nógv truplari, um feløgini ikki høvdu víst forstáilsi í verandi støðu.

Tað var nevniliga stutt fyri, at verkfallið byrjaði, at ILA í útbroti varð staðfest í alibrúkinum hjá P/F Luna á Gøtuvík.



Nú verkfall er, og eingin fiskur verður sendur feskur og ísaður av landinum ella arbeiddur á portiónsvirkjum í Føroyum, verður allur laksurin, sum verður tikin, frystur. Hetta gevur ein minni prís til framman undan so hart raktu alararnar, sum noyðast at drepa allan tann sjúka fiskin - og í summum førum áðrenn hann annars er tøkuførur.

## Bøtir um

Í Gøtu kundu 30 fólk fara til arbeiðis seinasta leygardag við undantaksloyvi frá arbeiðarafeløgunum.

- Vit frysta laksin í Gøtu og á Strondum, har vit hava leigað okkum inn, og nú kunnu vit taka tað, sum vit megna at frysta; tað eru eini 20-25 tons um dagin, sigur Atli Gregersen.

Hann vísir á, at var støðan vanlig, og vit ikki høvdu verkfall, hevði felagið kunnað tikið eini 60 tons av laksi um dagin.

- Men vit síggja longu nú, at tað hevur bøtt mundandi um støðuna á Gøtuvík, at vit hava fingið undantaksloyvi at arbeiða við 30 fólkum.

Hann vísir á, at tann sjúkasti fiskurin vanliga svimur ovast í nótini, og tað er í fyrsta lagi hendan fiskin, teir royna at fáa fatur á, soleiðis at fellið verður minni.

- Tað sær betur út í nótini nú, enn áðrenn tøkan byrjaði, sigur Atli Gregersen.

Myndirnar, sum vit prenta á hesi síðuni, tók Jens Kr. Vang í Gøtu týsdagin.